## DAGSINS MEINING

# Fullveldis(for)fall

Nú fall fullveldisætlanin. Løgmaður hevur nú viðgingið at hava framt fíggjarsvik fyri eina millión krónur fyri góðum 20 árum síðan. Hetta var løgmaður endurgivin fyri at siga í Dimmalætting týsdagin. Og í bókini Skjót journalistin verður skrivað, at løgmaður helst eisini hevur framt skjalafalsan.

Íkomin er tí ein heilt nýggj støða. Nú eru tað ikki longur talan um gitingar, men løgmaður hevur sjálvur viðurkent, at hann framdi fíggjarsvikið.

Samstundis verður sagt, at málið varð avgreitt og endað við einari avtalu millum løgmann og Frostvirkið. Ja, tað mugu vit trúgva, tá løgmaður sjálvur sigur hetta. Men samstundis mugu vit vísa á, at slíkt revsivert lógarbrot kunnu partarnir ikki enda við einari avtalu. Eftir (enn) galdandi rættarskipan er tað einans ákæruvaldið, sum kann taka slíka avgerð, uttan at málið hevur verið viðgjørt av einum dómstóli.

Nei, Tjóðveldisflokkur og Høgni Hoydal, talan er ikki um eitt tilvildarligt persónsmál, men um politik, moral og ikki minst almennu rættarkensluna, tá tað kemur fram, at Føroya løgmaður hevur framt lógarbrot, enntá groft lógarbrot. Øll vita, at tað ber ikki til hjá Palleba ella Marsannu at gera enda á eitt nú fíggjarsviki mótvegis Almannastovuni ella skattavaldinum við einari "avtalu" millum partarnar. Í slíkum førum fellur hamarin náðileysur við harðari revsing, hóast talan í slíkum førum einans kann vera um nakrar fáar krónur.

Tey eru mong, sum higartil hava tikið undir við yvirtøku av løgreglu og rættarskipanini, sum nú fara at venda hesum baki, um Tjóðveldisflokkurin ikki tekur eina greiðari støðu í hesum máli. Tí væntar flokkurin veruliga, at føroyingar skulu góðtaka eina rættarskipan undir fullveldinum, har munur verður gjørdur á landsins borgarum? Tað sýta vit enn at trúgva. Støðan hjá teimum smærru samgonguflokkunum er ikki verd so frætt sum eina viðmerking.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Taksametrið telur

**Helgi Abrahamsen**



Ein av útsøgnunum frá landsfundi Fólkafloksins tann 22. november var, at um Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin sleppa framat, so "tendra útreiðslutaksametrini aftur".

Eg loyvi mær í tí sambandi at gera vart við, at síðani 1998, tá Fullveldislandsstýrið bleiv skipað, eru landskassans útreiðslurnar øktar við 943 mió. krónum. Av hesum eru 906 mió. krónur rakstrarútreiðslur (uttan renur) og 200 mió. krónur eru íløgur. Rentuútreiðslurnar eru lækkaðar 163 mió. krónur.

Harumframt hava samgonguflokkarnir sagt neitakk til góðar 800 mió. krónur í blokkstuðli á inntøkusíðuni, so "taksametrið" hjá loysingarflokkunum er hesi árini komið uppá umleið 1.750 mió. krónur.

Tá vit so vita, at fullveldis/sjálvstýrislandsstýrið hevur sitið í tilsamans umleið 2.000 dagar, so er ikki ringt at rokna út, at útreiðslurnar á taksametrinum eru øktar við knøppum 900.000 krónum í meðal um dagin (um vit telja sunnudagar við).

Og so mugu vit ikki gloyma, at tað vóru hesir flokkarnir, sum settu sær fyri at Føroyar skuldu hava "sjálvberandi búskap".

- Nei taksametrið hevur helst einki at missa!

# Flogvøllurin - løgmaður

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Vónandi verður ein loysn funnin - ein góð loysn.

Eftir at løgmaður og skaðiligi loysingarpolitikkur hansara hevur verið beinleiðis orsøkin til, at onki er hent viðvíkjandi útbygging av flogvøllinum seinastu árini, er at vóna, at flogvøllurin nú verður útbygdur og longdur.

Um skaðiliga fullveldisætlanin ikki var á dagskrá, so hevði flogvøllurin í Vágum uttan nakað ivamál verið útbygdur í 1998 og 1999. Politikkur løgmans er higartil beinleiðis orsøkin til at onki er hent á hesum umráði.

Nú er at vóna, at hann er førur fyri at fáa eina avtalu við donsku stjórnina - eina góða avtalu um útbygging og leinging av flogvøllinum til 1800 metrar. Tað skyldar hann øllum føroyingum. Tí útbyggingina hevur hann í krónum longu nú goldið væl og virðiliga fleiri ferðir - nevniliga við at lata danir fáa 400 milliónir av ríkisveiting árliga.

So at fingið eina góða avtalu, tað átti at verið minsti trupulleikin.

Nú vóni eg ikki at hann av berari undirbrotligheit fer at ivirtaka fyri einhvønn prís. Tí hesa rokning eiga vit ikki. Møguliga kunnu vit gjalda ein part. Men ikki ein stóran part.

Men ivasamt er, um hann klárar at samráðast seg til eina góða avtalu viðvíkjandi flogvøllinum. Tí tað hevur hann ikki klára higartil.

Um hann ikki klárar at fáa eina góða avtalu um flogvøllin, so eigur hann onki at gera. Tí staðfestast má, at mangt av tí, ið løgmaður higartil hevur nortið við hevur gingist illa.

Um hann ikki klárar at gera eina góða avtalu, so rokni eg við, at aðrir lættliga megna tað. Tað skal nevniliga bert ein góður vilji til at fáa eina góða avtalu. Argumentini fyri einari góðari avtalu eiga vit nevniliga - ØLL!

# BRAK í Mentanarhúsinum

**Leygarkvøldið 6. desember fer nýggi bólkurin Brak at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Virksemi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði er í hæddini, og aftur hetta vikuskiftið verður jólaborðhald í húsinum. Aftaná jólaborðhaldið, ella umleið kl. 24.00, verður so almennur dansur, har nýggi bólkurin Brak fer at spæla góðar dansitónar. Sjálvur bólkurin er nýggjur, men flestu tónleikararnir í bólkinum eru garvarðir, og kendir úr øðrum føroyskum bólkum, m.a. Rok. Høvuðsmenninir eru Signar í Homrum og Ólavur Øster, sum báðir spæla guitar, meðan Signar eisini er sangari í bólkinum. Hinir limirnir eru John Johannesen, bass og sang, Tummas Gudmundsen, keyboard og Albin Ísaksson, trummur og sang. – Signar kenna vit serliga úr bólkinum Kjølar, sum var rættuliga væl umtóktur, ta tíð tað var. Seinastu tíðina hevur hann spælt við bólkinum Rok, og eisini teir eru vorðnir rættuliga væl umtóktur dansibólkur. Tónleikurin Brak spælir er bæði nýggjur og eldri dansitónleikur, ætlaður øllum aldursbólkum.

Dansurin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði byrjar um miðnáttarleitið. Um nóg stór undirtka er, koyra bussar úr Havn (tel 22 33 11), úr Vestmanna (tel. 217752), av Toftum og av Strondum (tel. 225220) til dansin og heim aftur aftaná.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fulltrúin skal vera sitandi í starvi




*Fiskimálaráðið skal nú taka endaliga støðu til, um fulltrúin skal uppsigast. Fakfelagið hjá fulltrúanum hóttir við at fara í rættin, um hann verður uppsagdur*

**Fakfelagið hjá fulltrúanum í Fiskimálaráðnum gongur ikki við til at fulltrúin verður ofraður. Verður maðurin uppsagdur, so skal málið í rættin**

FULLTRÚAMÁLIÐ
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Fulltrúin í Fiskimálaráðnum skal hava sítt starv aftur ella ætlar Búskapar- og Løgfrøðingafelagið at fara víðari við málinum og tað kann enda í rættinum.

Fakfelagið hevur svarað Fiskimálaráðnum, at felagið heldur, at alt er gjørt skeivt í hesum máli.

Í Fiskimálaráðnum upplýsir Jørman Petersen, fulltrúi, at tey viðgera spurningin og vænta at koma við endaligum svari í næstu viku.

Fulltrúin er ikki uppsagdur enn, men hann er heldur ikki til arbeiðis. Fiskimálaráðið hevur boðað honum frá, at ráðið ætlar at siga honum upp, men bæði hann sjálvur og fakfelagið hjá honum, hava rætt at gera viðmerkingar.

Tað hava bæði hann og fakfelagið nú gjørt, so nú er at bíða eftir eini endaligari avgerð úr Fiskimálaráðnum.

## Einki var í lagi

- Fiskimálaráðið hevur borið seg ósømiliga at og í fleiri førum brotið seg inn á galdandi siðvenju og reglur fyri uppsøgn av alment settum starvsfólki, verður sagt í skrivinum frá Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum.

Ítøkiliga orsøkin til, at Fiskimálaráðið ætlar at siga fultrúanum upp, er ein álvarslig átala frá Umboðsmanninum. Umboðsmaðurin átalaði Fiskimálaráðið fyri ikki at hava hildið svarfreistirnar í einum máli um alment innlit.

Hesa grundgeving góðtekur fakfelagið ikki:

- Fyri tað fyrsta metur fakfelagið ikki, at eitt mál um alment innlit kann fáa so grovar avleiðingar, at ein fulltrúi uttan leiðsluábyrgd verður sagdur úr starvi. Hetta er eitt brot á galdandi rættarreglur, har samband skal vera millum gjørdar feilir, og hvørjar avleiðingar hesir eiga at fáa.

## Ongar ávaringar

Í vanligum uppsagnarmálum eiga medarbeiðarar at fáa avaringar.

- Fulltrúin hevur hvørki fingið munnliga ella skrivliga ávaring undan uppsøgnini. Í hesum sambandi eigur tað at hava týdning, at fulltrúin hevur verið í starvi í Fiskimálaráðnum síðani 1995 uttan at fáa nakra slíka átalu ella ávaring, sigur Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið í sínum svarskrivi.

Fulltrúin sjálvur hevur eisini svarað. Sambært Niels Winther, formanni, í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, so tekur fulltrúin undir við sjónarmiðunum hjá felagnum og hevur lagt sínar egnu viðmerkingar afturat.

## Eykagrundgevingar

Í fráboðanini frá Fiskimálaráðnum verður bara víst til átaluna frá Umboðsmanninum.

Men í sjónvarpinum nevndi landsstýrismaðurin, at talan eisini var um persónlig mál.

- Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið átalar harðliga framferðina hjá landsstýrismanninum í Fiskimálum, tá hann alment sigur, at persónlig viðurskiftir gera seg galdandi í sambandi við uppsøgnini. Einki stendur um hetta í ætlanarskrivinum, sum frá Fiskimálaráðnum. Felagið metur hetta vera sera ódámligan framferðarhátt, og vil strangliga átala at sverta eitt starvsfólk alment út á henda hátt. Almenni starvsfólka politikkurin leggur upp til, at starvsfólk skulu vera viðfarin á virðiligan hátt, eisini tá tað snýr seg um uppsøgnir, skrivar fakfelagið hjá fultrúanum.

## Ábyrgdin er tín

Fiskimálaráðið tykist ikki at hava umhugsað, um ábyrgdin eisini kundi áleggjast onkrum hægri uppi í skipanini. Víst verður bara til, at fulltrúin ikki hevur hildið svarfreistina til umbønina um innlit. Í brævinum til fultrúan stendur:

- Fiskimálaráðið er av somu áskoðan sum Umboðsmaðurin, og ein handfaring av einum máli kann als ikki góðkennast, tí hetta er eitt álvarsligt brot á greitt ásettar lógarreglur um innlit.

Víðari verður grundgivið fyri, hví júst fultrúin skal ábyrgdast:

- Fiskimálaráðið metir hetta at vera so mikið álvarsligt brot á skyldu hjá einum starvsfólki at útinna starvið samvitskufult og við nærlagni, at neyðugt er at siga tygum úr starvi.

# Gunnar sum fýrari



**Veddingarfyritøkurnar meta ikki, at hálvi føroyingurin, Gunnar Mikkelsen, fer avstað við sigrinum í Stjerne for en aften. Tað er Jan Nielsen, sum bert slapp í part, tá DR gjørdi av at koyra Jens Marna Hansen úr kappingini**

STJØRNUKVØLD
*Jákup Mørk*

Finalan í sangkappingini hjá Danmarks Radio, Stjerne for en aften, verður nú fríggjakvøldið, og sum vera man, so er spenningurin stórur um, hvør tað verður, sum fer avstað við sigrinum.

Og ymsu veddingarfyritøkurnar hava longu gjørt greitt, hvussu tær rokna við, at alt fer at spæla av.

Jan Nielsen, 38 ára elektrikarin av Amager, sum hevur bergtikið við sínum framførslum av kærleikssongum. hevur í undankappingunum staðið seg somikið væl, at bæði danska Tipstænastan og Centrebet hava hann sum favoritt til heitið. Hann gevur bert pengarnar aftur 2,00 og 2,10 ferðir, um hann verður vinnarin.

Áhugavert er í hesum sambandi, at tað var við einum føroyskum millumspæli, at Jan Nielsen yvirhøvur kom við í kappingina. Upprunaliga var hann nevnliga als ikki við millum luttakararnar, sum vóru í kappingini. Men tá DR so í evstu løtu valdi at koyra føroyska Jens Marna Hansen úr kappingini, skuldi eitt pláss mannast.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at áhugaði kundu ringja inn til eina sokallaða stjørnutelefon, har tey í ein minutt kundu royna songrøddina. Lurtarar á P3 kundu síðani gera av, hvør skuldi fáa leysa sessin, og hetta gjørdist so 38 ára gamli elektrikarin.

## Gunnar á fjórða plássi

Annars verður roknað við, at lítla Lene Matthiesen og Kalle Brandt eru tey bæði, sum fara at bjóða Jan av í kappingini. Kanska serliga Lene, sum hjá Unibet verður roknaður sum stóri favoritturin, og geva tey bert odds 1,85 fyri lítlu gospel-sangarinnuna sum vinnara.

Síðani eru allar fyritøkurnar samdar um, at Gunnar Mikkelsen verður tann næsti. Hann gevur pengarnar fýra ferðir aftur, um hann vinnur, og skulu veddingarfyritøkurnar takast fyri fult, so er langt niður til tey bæði seinastu. Tey eru Heidi Lund Jensen og Thomas Stenberg Hansen, men hjá onkrari veddingarfyritøku er odds'ið heilt uppi á 21, um tað verður onkur av teimum, sum strýkur avstað við fyrstaplássinum og plátusáttmálanum.